## Útiseti sýnir glaslist í Riberhus

Frá mánadegnum 4. august fer Hans Andreas Joensen at hava framsýning í Riberhus í Fuglafirði. Hans Andreas, sum er leirvíkingur, men býr í Esbjerg, hevur arbeitt við glaslist í mong ár og fer at sýna ymsar glaslutir á framsýningini í Fuglafirði. Hans Andreas hevur havt framsýningar í Føroyum fyrr, eins og hann hevur luttikið á framsýningum í Danmark, einsamallur og saman við øðrum. Framsýningin í Riberhus er opin allan august mánað.



# Tobbi avhøvdar allan línuflotan

**Politikararnir hava skyldina av, at tað eru ov mong línuskip, men nú skal vinnan bøta, fyri at teir kunnu rætta mistøkini, sigur formaðurin í Felagnum Línuskip**




*Jóhannes Olsen (vm) er reiðari á Mascot og trimum øðrum línuskipum. Hin maðurin á myndini er Virgar Hentze*
*Mynd: Nes kommuna*

FISKIVINNA
*Árni Joensen:*

Jóhannes Olsen á Toftum er ikki serliga hugtikin av tí fyrsta uppskotinum, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Torbjørn Jacobsen, hevur lagt fyri Løgtingið, nú nýggja tingárið er byrjað. Sum formaður í Felagnum Línuskip og reiðari á línuskipunum Eysturoyingi, Sigmundi, Morgunstjørnuni og Mascot heldur Jóhannes Olsen lítið um, at fiskidagarnir hjá línuskipunum skulu skerjast heili 50 prosent.

- Hattar er tað sama sum at avhøvda línuflotan, tí ikki eitt einasta línuskip klárar seg við helvtini av fiskidøgunum, sigur Jóhannes Olsen við Sosialin.

Formaðurin hjá línuskipunum sigur, at fiskidagaskipanin er soleiðis skrúvað saman, at hon er sjálvregulerandi, men at ætlanin hjá landsstýrismanninum fer at avskepla skipanina fullkomiliga.

### Politikararnir feilin

Í dag eru 25 línuskip í flotanum, og formaðurin í línuskipafelagnum ásannar, at skipini eru ov mong í tali. Men tað eru ikki línuskipareiðararnir, sum hava skyldina av, at línuskipaflotin er ov stórur.



*Jóhannus Olsen: - Uppskotið hjá Torbirni Jacobsen kappar høvdið av línuskipuflotanum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Felagið hjá okkum hevur hvørja einastu ferð ávarað myndugleikarnar ímóti at loyva fleiri línuskipum inn í flotan. Tað kunnu vit skjalprógva, men tað er eisini prógvfast, at politikararnir hava ikki lurtað eftir okkum, og tí er støðan, sum hon er, sigur Jóhannes Olsen, sum heldur lítið um, at politikararnir nú royna at skerja línuflotan við at skerja dagatalið.

- Nú royna politikararnir so at vaska sær um hendurnar og at rætta sínar feilir við at revsa allar yvir ein kamb. Tað er púra burturvið, sigur Jóhannes Olsen.

### Revsa skeivan flota

Formaðurin hjá línuskipunum skilir heldur ikki, at landsstýrismaðurin hevur valt at skerja fiskidagarnar hjá línuflotanum mest. Hann vísir á, at hetta samsvarar illa við tað, sum løgmaður segði í síni á ólavsøku um at skerja $CO_2$-útlátið, tí línuskipini er húkaflotin annars eru tann parturin av føroyska fiskiflotanum, sum hevur tað minsta $CO_2$-útlátið.

- Tað er púra burturvið at skerja tann partin av flotanum, sum hevur tað minsta $CO_2$-útlátið, og sum fer best við umhvørvinum, sigur Jóhannes Olsen, sum hóast alt sigur seg hava álit á, at løgtingslimirnir sissa seg og vraka uppskotið hjá landsstýrismanninum.

# Kaupthing stórt avlop

**Hóast ótryggar umstøður hevði íslendski Kaupthingbankin stórt avlop fyrra hálvár**

Kaupthing kunngjørdi í morgun, at felagið hevði 15,4 milliardir íslendskar krónur í avlopi í øðrum ársfjórðingi í ár. Tað merkir sambært Morgunblaðnum, at Kaupthing hevði góðar 34 milliardir íslendskar krónur í avlopi fyrra hálvár. Tað er slakar 12 milliardir krónur minni enn seks teir fyrstu mánaðirnar í fjør.

Hreiðar Már Sigurðsson, forstjóri í Kaupthingi, sigur í einum tíðindaskrivi, at bankin sleppur ikki undan ávirkan uttaneftir heldur enn aðrir íslendskir bankar, men at bankin hevur klárað seg væl higartil.



*Hreiðar Már Sigurðsson er forstjóri í Kaupthing*
*Mynd: Morgunblaðið*